












at menna vinaløgini millum børnini, at práta um kenslur og at seta mørk, siga tær báðar, sum eru ávikavist pedagogur og hjálparfólk á stovuni. Umframt tær báðar arbeiðir Sólfríð eisini á stovuni, men hon hevur frí í dag.

– Vón okkara er, at verkætlanin gevur børnunum eina felags hugmynd av hugtøkum sum at hjálpa, at geva kærleika, at lurta og at seta orð á kenslur. Tí læra vit tey at tosa við støði í sær sjálvum, og at lurta eftir hvørjum øðrum. Til dømis kann eitt barn siga, at: »eg verið kedd, tá tú flennir eftir mær. Tí vil eg, at tú skal ikki gera tað meira,« og barnið í hinum endanum lærir at steðga á og at lurta eftir boðskapinum hjá vininum, siga tær báðar. Og tær greiða víðari frá, at um børnini á hendan hátt læra at virða hvønn annan, kemur tað teimum vónandi til góðar øll barnaárini, skúlaárini og tá tey gerast vaksin.

– Hetta er eitt miðvíst pedagogiskt arbeiði fyri trivnaði, sum skal forða fyri happing og at børnini fara út um mark, siga tær og vísa millum annað á søguna um teir tríggir vinirnir, sum vit prenta her á síðuni.

## Hjálpibørn

Annað, sum tær ganga høgt uppí á Ternustovu er, at tey eldri børnini eru góðar fyrimyndir og hjálpa teimum smærri børnunum, sum nýliga eru komin úr vøggustovuni. Soleiðis eru børnini skjót at siga frá og hjálpa, um til dømis »teirra« barn er liðugt á vesinum, tá tað dettur ella um tað grætur. Soleiðis vóna tey í Ternustovu, at børnini læra ábyrgdarkenslu fyri hvørjum øðrum.

Og Dánjal sigur, at kærleiki er ikki at flenna eftir hvørjum øðrum og Rókur samtykkir og sigur, at tað er nemmiliga at arga.